F E L A G I Ð   P E N I N G A S T O V N A R
P O S T S M O G A   3 0 4 8 - F O   1 1 0   T Ó R S H A V N

Vinnumálaráðið
Tinganes
Postbox 377
FO 110 Tórshavn

Tórshavn 5. februar 2007

**Uppskot til løgtingslóg um kapping**

Vinnumálaráðið hevur lagt uppskot til nýggja kappingarlóg út á heimasíðu sína til hoyringar. Hoyringsfreistin er sett til 5. februar 2007.

Felagið Peningastovnar hevur gjøgnumgingið tilfarið og hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

Uppskotið er stórt sæð ein yvirseting av donsku kappingarlógini, sum hon sá út fyri nøkrum árum síðani. Kappingarlógin sum í dag er galdandi í Danmark, hevur verið gjøgnum framstig á nógvum økjum. Mest sanlíkt, ger tað sama seg galdandi fyri kappingarlóggávuna í hinum norðanlondunum og ES, men hevur Felagið Peningastovnar ikki tikið sær stundir at kanna hetta. Her skulu nøkur viðurskifti verða tikin fram:

Rættartrygdin hjá regulerraðu fyritøkunum er økt munandi, við tað at danska kappingarlógin nú í nógv størri mun byggir á ítøkiligar ásetingar og markvirði, heldur enn rúmar og subjektivar orðingar, ið skulu leggjast til grund fyri ítøkiligum metingum og heimildum at gera nærri ásetingar um, nær ein fyritøka ella eitt virksemi stríðir móti kappingarlógini.

T.d. setir § 12 í donsku lógini markvirði fyri nær ein samanlegging er fevnd av forboðnum í lógini, og § 12 a, stk. 4 og 5 setir greið mørk fyri hvat er at skilja við eina samanlegging, soleiðis at t.d. virksemi hjá fíggjarligum fyritøkum viðv. virðisbrøvum og virkjum er undantikið.

Felagið Peningastovnar leggur stóran dent á at fáa hesar ásetingar við í sambandi við endurskoðanina av føroysku kappingarlógini, heldur enn óítøkiligu ásetingarnar í § 13 í uppskotinum.

Tað sama ger seg galdandi fyri § 14 í uppskotinum í mun til § 12c í donsku lógini. Danska orðingi er munandi greiðari. Mælt verður tí eisini her til at nýta donsku orðingina.

Umframt hetta er í donsku lógini § 12e givin møguleiki at áseta treytir fyri góðkenning av eini samanlegging, heldur enn at nokta góðkenning. Eisini hetta átti at verið umhugsað í føroysku lógini.

Harumframt fevnir danska kappingarlógin nú eisini um vinnuvirksemi sum verður stuðla við almennum peningi. Felagið Peningastovnar metir ikki tørvin á hesum verða minni í Føroyum og mælir tí til at §§ 1 og 11a í galdandi donsku kappingarlógini verða tiknar við í Føroysku lógini, við neyðugu tillagingunum í § 19, stk. 3.

T E L E F O N   3 1 6 9 2 0          T E L E F A X   3 1 9 9 3 6

F E L A G I Ð   P E N I N G A S T O V N A R
P O S T S M O G A   3 0 4 8  –  F O   1 1 0   T Ó R S H A V N

§ 10a ("dominerende virksomheders samhandelsbetingelser"), §15a (partsinnlit), §15c og § 19, stk. 5 (mál) í donsku lógini, umframt nýggju ásetingarnar um heimild at almannakunngerða fráboðaðar um samanleggingar eru heldur ikki við í uppskotinum. Felagið Peningastovnar hevur tó onga meining um hesar ásetingarnar.

Felagið Peningastovnar hevur hesar viðmerkingarnar til sjálvt uppskotið:

Í § 6 eru sett nøkur markvirði fyri nær kappingaravlagandi avtalur eru fevndar av forboðnum í lógini. Okkurt tykist verða galið við hesum markvirðinum, við tað at markvirði 1) útilokar markvirði 2). Í viðmerkingunum verða eisini nevnd nøkur heilt onnur markvirði og verður samanborið við donsku lógina eru markvirðini har heldur ikki tey somu. Spurningurin er um markvirði 1) skal verða í mia. heldur enn mió., hetta vildi samsvara beturi við donsku lógina? Viðmerkingarnar hinvegin venda markvirðunum við?

Við § 7, stk. 4 fær landsstýrismaðurin í kappingarmálum heimild at áseta reglur um at umsetningsmarkvirðini nevnd omanfyri skulu roknast við støði í øðrum virðum fyri fíggjarligar fyritøkur. Ongar nærri ásetingar eru hesum viðvíkjandi. Felagið Peningastovnar mælir til, at nærri karmar verða settar fyri hesi heimild.

Í §23, stk. 2 fær Kappingarráðið heimild at krevja upplýsingar frá øðrum myndugleikum óheft av tagnarskyldu teirra. Mælt verður til, at hetta ikki eigur at verða gjørt uttan at kunna viðkomandi persónar. Spurningurin er eisini um § 24, stk. 1, 4. pkt. og § 30, stk. 4, 1. pkt. ikki eru ov víttgangandi. Tær eru t.d. ikki at finna í donsku lógini.

Eisini skal verða víst á, at § 30, stk. 1 nr. 7 í uppskotinum er skriva á donskum og at tilvísingar millum greinar í lógini, í nógvum førum eru skeivar. T.d. § 6, stk. 4, § 10, stk. 1 og 2, § 11, stk. 6, § 18, stk. 1 og 2, § 26, stk. 1 og § 30, stk. 1, nr. 3. Harumframt eru setningar og orð dottin burturímillum ella komin dupult í yvirsetingini ymsastaðni og lógarteksturin kann eisini í støðum verða tungur at lesa orsaka av nýføroyskaðum faghugtøkum, ið eru ring at skilja og venja seg við.

Vinarligar heilsanir

**Felagið Peningastovnar**

Janus Petersen
formaður

T E L E F O N   3 1 6 9 2 0        T E L E F A X   3 1 9 9 3 6